# Gjáar søga út í bók

BÓKAÚTGÁVA
*Stefan í Skorini*

Petur Jacob Sigvardsen hevur givið út fjórða bind av bókini »Úr Gjáar søgu«. Tvær tær fyrstu bøkurnar hava undirheitið »barnaminni«, meðan tær seinnu hava undirheitið »gamla tíðin«. Henda nýggjasta bókin nevnist »Úr Gjáar søgu – gamla tíðin 2«.

Barnaminni komu út í 1997 og 1998, meðan bøkurnar, ið viðgera gomlu tíðina, komu út í 2000 og 2001. Rithøvundurin Petur Jacob Sigvardsen hevur áður roynt seg um týðara.

Henda bókin, sum nú er útkomin, snýr seg m.a. um kommunuviðurskifti, gudslívið, kirkjuviðurskifti, skúlaskap í gomlum døgum, fólkateljingar og fólkatalsyvirlit, tað fjølbroytta felagslívið, rithøvundar og politikk.

Fleiri forvitnisligar frásagnir eru eisini at lesa í bókini. Eitt nú um tey fornisku, har greitt verður frá yvirnatúrligum hendingum í bygdini. Harumframt eru skemtisøgur og frásagnir frá roysni, brøgdum og pátrúgv.



*Fjórða bind av Gjáar søgu er komið út. Petur Jacob Sigvardsen hevur skrivað*

Hans Jacob Debes hevur sagt um hinar bøkurnar, »at verkið er ótrúliga væl skrivað, lært og vandaliga gjørt. Tað er meistarliga sett saman og er eitt virðismikið rit, sum ikki bert kann frøa gjáarfólk, men allar føroyingar, tí her er til skjals ein bygdarsøga, sum man vera tann besta av sínum slagi, sum skrivað er her á landi«.

Bókin lýsir bygdarlívið fyrr í tíðini og er grundað á eitt fjølbroytt og rúgvismikið keldutilfar. Bygdarlívið fyrr líktiskt nógv í teimum ymsu bygdunum, og tí munnu tey flestu kenna seg aftur í bókini, hóast hon snýr seg um Gjógv.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, partvís kavi, men eisini sólglottar. Hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Hvassur vindur ella skrið av suðri og stundum regn ella vátaslettingur. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið mánadagin:**
Fyrrapartin strúkur í vindi av útsynningi og okkurt ælið, men seinnapartin veksur hann vindin til skrið ella storm av landsynningi og regn. Hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Fyrst skrið av suðri og regn, men seinnapartin týsdagin minni vindur av vestri og okkurt ælið. Hitin millum 3 og 6 stig. Mikudagin stívt andøvsgul av útsynningi og ælingur, partvís kavi og hitin millum frostmarkið og 3 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷17 |
| Nuuk | – |
| Qaqortoq | ÷10 |
| Ammassalik | ÷7 |
| Saint John's | ÷6 |
| Halifax | 0 |
| Reykjavík | ÷3 |
| Seyðisfjørður | ÷1 |
| Tórshavn | 3 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 13 |
| Tromsø | 3 |
| Bergen | 4 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 3 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | ÷1 |
| Moskva | ÷9 |
| Berlin | 4 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | ÷2 |
| Bukarest | 1 |
| Paris | 9 |
| Madrid | 8 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 17 |
| Athen | 12 |
| Malta | 16 |
| Tunis | 16 |
| Beijing | 5 |
| New Dehli | 21 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | – |
| Sydney | – |
| New York | 10 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 10 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 31 |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 18 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 980 hPa. vestan fyri Skotland fer skjótt í landnyrðing norðan og dýpist.




Lágtrýstið yvir Grønlandsfjørðinum fer spakuliga eystureftir og brúgvalagið haðani verður væntandi við Føroyar sunnudagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 29/11 kl. 06[00]– 30/11 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 3,2°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 29/11 kl. 06[00]– 30/11 kl. 06[00]
Avfallið higartil í november: 155,1 mm

Brúðarlín
v/ Anniku Gaard
Fagralíð 22
Tlf./Fax. 314281
Brúðar- og brúðargentukjólar við tilhoyri til leigu
Nýggir kjólar kunnu útvegast

Radio-verkstaður
Umvæling av:
● Sjónvarpum
● Videotólum
● Hi-Fi
Vit umvæla:
PHILIPS
PANASONIC
SAMSUNG
og onnur merki
Fokus ELEKTRONIK
Reynstún 19 · Argir
Tlf. 311306 - Fax 311306

## VESTFALLSKYRRINDI

23. nov.: Mánin longst frá jørðini
30. nov.: Fullmáni
6. des.: Mánin næstur jørðini
7. des.: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. des | 06.30 | 18.55 | 05.30 | 17.55 | 05.45 | 18.10 | 08.30 | 20.55 | 09.30 | 21.55 | 04.45 | 17.10 | 03.45 | 16.10 | 06.45 | 19.10 | 07.45 | 20.10 | 06.15 | 18.40 | 07.30 | 19.55 |
| 2. des | 07.20 | 19.47 | 06.20 | 18.47 | 06.35 | 19.02 | 09.20 | 21.47 | 10.20 | 22.47 | 05.35 | 18.02 | 04.35 | 17.02 | 07.35 | 20.02 | 08.35 | 21.02 | 07.05 | 19.32 | 08.20 | 20.47 |
| 3. des | 08.15 | 20.41 | 07.15 | 19.41 | 07.30 | 19.56 | 10.15 | 22.41 | 11.15 | 23.41 | 06.30 | 18.56 | 05.30 | 17.56 | 08.30 | 20.56 | 09.30 | 21.56 | 08.00 | 20.26 | 09.15 | 21.41 |
| 4. des | 09.07 | 21.33 | 08.07 | 20.33 | 08.22 | 20.48 | 11.07 | 23.33 | — | 12.07 | 07.22 | 19.48 | 06.22 | 18.48 | 09.22 | 21.48 | 10.22 | 22.48 | 08.52 | 21.18 | 10.07 | 22.33 |

5 707265 100067 >